UTTAN ÚR HEIMI

## Nøgdir sviar

Ein nýggj kanning vísir, at sviar eru væl nøgdir við tey flestu viðurskiftini í samfelagnum.

Millum annað vísir kanningin, at sviar eru væl nøgdir við heilsuverkið, barnaansingina, eldrarøktina, og sum skúlaverkið verður sagt, at skúlin hevur ongantíð verið betri, enn hann er nú. Svensku myndugleikarnir hava seinastu trettan árini kannað, hvat fólk halda um tey almennu viðurskiftini, og kanningarnar vísa, at tað hevur gingið støðugt framá øll trettan árini. Hetta er ivaleyst eisini orsøkin til, at politiskir mótmælisflokkar hava ikki fingið fótafesti í Svøríki seinastu nógvu árini.

Okkurt kundi tó verið øðrvísi, treyðugt so. Tann nýggja kanningin avdúkar, at fólk eru ikki nøgd við løgregluna og hennara arbeiði, og skattamyndugleikarnir eru sambært kanningini sera illa umtóktir.

## Doyðu í skalvalopi

Sjey ungfólk doyðu, tá ein skalvur leyp oman yvir tey í landspartinum British Columbia har vesturi í Kanada um vikuskiftið.

Tey sjey, seks dreingir og ein genta, gingu í 10. flokki á sama skúla og vóru farin á útferð í fjøllunum. Á vegnum møttu tey nøkrum ferðaleiðarum, sum ávaraðu tey um at fara longur niðan, tí har var stórur vandi fyri skalvalopum. Eina løtu seinni leyp ein skalvur og tók skúlanæmingarnar við sær. Tá bjargingarliðini komu á staðið, vóru sjey av ungfólkunum deyð.

Kanadisku myndugleikarnir siga, at skalvurin, sum leyp oman yvir skúlanæmingarnar, var hálvan annan kilometur breiður. Hetta er aðru ferð í vetur, at skalvalop í British Columbia hevur kravt mannalív.

## Eldur kravdi 33 mannalív

33 fólk doyðu, tá eldur kom í eitt hotell í býnum Harbin har norðuri í Kina sunnudagin.

Almenna tíðindastovan, Xinhua, skrivaði í gjár, at 33 fólk vóru deyð, og at fleiri vóru løgd inn á sjúkrahús við brunasárum og øðrum løstum. Sambært Xinhua vóru fleiri teirra í lívsvanda.

Sambært myndugleikunum vóru umleið hundrað fólk inni á hotellinum, tá eldurin kyknaði. Tey vóru komin til Harbin at halda tað kinesiska nýggjárið. Enn vita myndugleikarnir ikki, hví eldur kom í hotellið.

## Vilja hava navnið aftur

Nú 60 ár eftir tann stóra bardagan um russiska býin Stalingrad krevja gamlir russiskir hermenn, sum bardust við týskararnar, at býurin skal fáa navnið Stalingrad aftur. Býurin hevur annars itið Volgograd síðani 1961.

- Í mínum hugaheimi eitur býurin framvegis Stalingrad. Allur heimurin kennir hetta navnið og veit um tað, sum hendi her fyri 60 árum síðani, sigur tann 80 ára gamli Fjodor Kovalitsj, sum var millum teir russisku hermenninar, sum róku týskararnar úr býnum. Nógvir aðrir gamlir hermenn taka undir við honum.

Men Vladimir Putin, forseti er ímóti at geva býnum tað gamla navnið aftur. Fyri nøkrum døgum síðani segði forsetin, at mong fara ikki at skilja tað, fær býurin aftur navn eftir Stalin.

# Eingin tók við eftir Havel

**Kekkiski forsetin, Vaclav Havel, fór frá sunnukvøldið, men eingin er at taka við eftir hann**

KEKKIA
*Árni Joensen:*

Á midnátt sunnukvøldið fór Vaclav Havel úr kekkiska forsetaembætinum, tí tá var seinna valskeið hansara liðugt.

Men eingin var at taka við eftir tann navnframa forsetan, sum fram um allar aðrar verður roknaður sum frælsismaður kekka. At forsetastólurin stendur tómur, eftir at hann er farin frá, er sambært eygleiðarum eitt tekin um, at ein veruligur politiskur kappi hevur lagt frá sær.

Tvær reisur hevur kekkiska tjóðartingið roynt at velja ein eftirmann til Vaclav Havel, men báðar ferðirnar miseydnaðist tað.

Nú hann fór frá, og til eftirmaður hansara er valdur, skulu formaðurin í tjóðartinginum og Vladimir Spidla, forsætisráðharri umsita skyldur forsetans.

# SPD fyri stórum ósigri

**Sum væntað taptu týsku sosialdemokratarnir tey bæði landspartavalini, sum vóru um vikuskiftið. Teir konservativu høvdu stóra framgongd**

TýSKLAND
*Árni Joensen:*

Ósigurin í Niedersachsen og Hessen var ikki bert ein ósigur fyri sosialdemokratiska flokkin SPD, men eisini fyri ríkiskanslaran, Gerhard Schrøder.

Í sínum landspartinum hjá Schrøder, Niedersachsen, misti SPD meirilutan. Á valinum í 1998 fekk flokkurin 47,9 prosent av atkvøðunum, men hesaferð atkvøddu bert 34 prosent fyri flokkinum. Harafturímóti fekk tann konservativi andstøðuflokkurin CDU 47 prosent hesaferð ímóti 35,9 prosentum fyri fýra árum síðani.

Í Hessen gekst lítið mætari hjá sosialdemokratunum. Í hesum landspartinum standa teir konservativu vanliga sterkir, og so var eisini hesaferð. Á valinum í 1998 fekk CDU 43,4 prosent í Hessen og hesaferð næstan 50 prosent.



*Høvuðsvalevnið hjá CDU í Niedersachsen, Christian Wulff, hevði alla orsøk til at vera í góðum hýri, tá hann og konan vóru og greiddu atkvøðu. Eins og í Hessen vann CDU stórsigur í Niedersachsen*

SPD fekk 29,5 prosent ímóti 39,4 prosentum í 1998.

Tey Grønu fingu 7,5 prosent í Niedersachsen og 10,0 prosent í hessen, meðan Fríu Demokratarnir fingu 8,5 prosent í báðum landspørtunum.

### Ikki bert kríggið

Tá Gerhard Schrøder og SPD vunnu valið til samveldisdagin seinasta summar, varð sagt, at tað var mótstøða hansara ímóti einum kríggi við Irak, sum bjargaði honum valsigurin. Landspartavalini um vikuskiftið vístu, at hesin politikkurin gagnaði ikki flokkinum nú.

Eygleiðarar í Berlin siga, at nógvir týskarar eru ímóti amerikansku ætlanini at leypa á Irak, og at teir styðja kanslaran í tí málinum, men veljararnir hava eisini onnur áhugamál. Eitt nú er arbeiðsloysið farið upp um tíggju prosent, og búskapurin er illa fyri. Roknað verður við, at búskaparvøksturin fer at liggja um eitt prosent í ár.

# Verkfallið í Venesuela av

**Eftir áhaldandi verkfall í 63 dagar avgjørdi andstøðan í Venesuela at enda verkfallið gjáranáttina**

VENESUELA
*Árni Joensen:*

Tað drúgva verkfallið, sum hevur lagt alt tað venesuelanska samfelagið lamið í meiri enn tveir mánaðir, er av, men tann politiska andstøðan leggur dent á, at hetta merkir ikki, at stríðið ímóti Hugo Chavez, forseta er av.

Sunnudagin skrivaðu fleiri hundraðtúsund fólk undir eina áheitan á forsetan um at skriva út nýval, men tað tóktist ikki órógva forsetan. Tvørturímóti segði hann, at tað var hann, sum hevði vunnið bardagan við andstøðuna og fakfeløgini, og hann hótti við at draga verkfalsleiðararnar í rættin.

Talsmaðurin hjá andstøðuni, Timoteo Zambrano, segði í gjár, at andstøðan og fakfeløgini fara at halda fram við bardaganum ímóti forsetanum, og hann legði dent á, at í fyrsta umfari ræður um at verja rættindini hjá teimum, sum hava fingið sekkin, síðani verkfallið byrjaði. Eitt nú hevur Chavez givið meiri enn 5.000 starvsfólkum hjá almenna oljufelagnum sekkin, tí tey tóku lut í verkfallinum.

Síðani verkfallið byrjaði, hevur oljuframleiðslan í Venesuela ligið at kalla still. Landið er annars fimtistørsta oljuframleiðaralandið í heiminum.



# »Columbia« var útslitin

**Longu fyri tveimum árum síðani ávaraði ein av serfrøðingunum hjá amerikansku rúmdarumsitingini um, at rúmdarferjan »Columbia« var útslitin. Í fjør bað NASA um pengar til umvælingar, men politikararnir lurtaðu ikki**

COLUMBIA-VANLUKKAN
*Árni Joensen:*



*Hóast nógvar ávaringar varð »Columbia« skotin út í rúmdina tann 16. januar. Leygardagin sprongdist hon 62 kilometrar uppi yvir Texas. Her sæst eitt av teimum nógvu pettunum*

Seinastu tvey árini hava bæði rúmdarumsitingin NASA og stjórnin í Washington fingið fleiri ávaringar um, at vandi var fyri einari vanlukku við einari av teimum amerikansku rúmdarferjunum.

Ein av teimum, sum ávaraðu um vandan fyri einari vanlukku, var verkfrøð-ingurin Don Nielson, sum var við til at gera ta amerikansku rúmdarferjuverkætlanina.

- Skulu vit sleppa undan einari vanlukku sum henni við rúmdarferjuni »Challenger« í 1986, mugu vit taka neyðug stig alt fyri eitt. Tann alt ov tunga og útslitna »Columbia« má takast úr flúgving beinanvegin, segði Don Nielson í einari av sínum ávaringum. Men leiðslan í NASA lurtaði ikki eftir Don Nielson, hóast hann hevði arbeitt hjá rúmdarumsitingini í ellivu ár og havt ein týðandi lut í júst rúmdarferjuverkætlanini.

Kortini treyt ikki við øðrum ávaringum. Í 1999 mátti NASA útseta eina ferð hjá »Columbia«, tí brek vóru við einum brennievnistanga. Sama ár máttu allar ferðir hjá rúmdarferjuni »Discovery«, sum er av sama slagi sum »Columbia«, avlýsast, tí menn komu fram á fleiri brek við terri elektrisku skipanini.

Í august í 2000 avdúkaði ein kanning ikki færri enn 3.500 brek í elektrisku skipanini umborð á »Columbia«. Í oktober sama ár mátti ein ferð hjá ferjuni avlýsast, tí vandi var fyri spreinging í einum av brennievnistangunum, tá ferjan skuldi skjótast út.

### Skerd játtan

Fyri einum ári síðani staðfesti leiðslan í NASA, at neyðugt var at útvega umsitingini meiri pengar til viðlíkahald av útgerðini á jørðini og rúmdarferjunum. Undir einari hoyring í kongressini í apríl ávaraði leiðarin fyri trygdardeildini hjá NASA politikararnar um, at vandi var fyri einari vanlukku í rúmdini.

Richard Bloomberg fanst undir hoyringini hvassliga at kongresslimunum, tí teir høvdu skert játtanina til NASA, og hann ávaraði um, at hetta fór at koma trygdini við rúmdarferjunum í vanda.

- Hugsanir mínar siga mær, at halda vit fram á hendan hátt, fáa vit fyrr ella seinni eina vanlukku, segði trygdarovastin hjá NASA í kongressini. Og hann legði afturat:

- Øll tey árini, eg havi verið uppi í okkara rúmdarverkætlanum, havi eg ongantíð stúrt so nógv fyri trygdini hjá rúmdarferjunum, enn eg geri nú.

Eftir vanlukkuna við rúmdarferjuni »Challenger« í 1986 varð avgjørt at steðga øllum ferðum við rúmdarferjunum í tvey ár. Hesi árini setti NASA trygdina í hásætið, og á heysti í 2000 bað tann serliga rúmdarnevndin hjá kongressini NASA gera ferjurnar uppaftur tryggari. Fyri einum ári síðani staðfesti trygdarumsitingin hjá NASA so, at hon hevði bøtt um trygdina, men at tað bar til at gera ferjurnar uppaftur tryggari, fekk NASA tann neyðuga peningin.

Men politikararnir valdu kortini at skerja játtaina til rúmdarumsitingina.

Pengarnir, sum NASA bað um, skuldu nýtast til at endurnýggja ta gomlu útgerðina í Houston og Florida og at gera ábøtur umborð á rúmdarferjunum. Hetta seinna hevur ligið á láni, tí tað vísti seg at vera ógvuliga dýrt at umvæla »Columbia«.

Nú er ov seint.



*Tey sjey, sum fórust við »Columbia«. Maðurin í miðjuni í fremra raði  er Rick Husband, sum var skipari á »Columbiu«.*

## Tey seinastu orðini

**»Roger....buhh....«**

Tað vóru tey seinastu orðini frá rúmdarferjuni »Columbia«. Maðurin, sum tosaði umborð, var sum vant skiparin, tann 45 ára gamli Rick Husband.

Brádliga var tøgn.

Alt vísir seg at vera í lagi til klokkan 07.53 Texas-tíð. Tá missir eftirlitið sambandið við hitamátararnar á vinstra vongi á ferjuni. Klokkan 07.56 svíkja mátararnir í vinstra hjólinum. Annars vísir alt seg at vera í lagi. Klokkan 07.58 svíkja tríggir hitamátarar í vinstra vongi. Nakrar minuttir seinni staðfestir eftirlitið, at lufttrýstið í vinstra hjóli er  ov lágt.

Í eftirlitinum kallar Charlie Hobaoug:

-»Columbia«, Houston. Vit síggja, at okkurt er við lufttrýstinum, men vit hoyrdu ikki tað seinasta.

Rick Husband:

Roger....buhh...

Røddin tagnar. Bara sús er at hoyra. Beint eftir steðga teldusignalini á eftirlitstólunum.

Charlie Hobaugh kallar aftur:

-»Columbia«, Houston. Hetta er ein samskiftisroynd.

Framvegis tøgn.

Charlie Hobaugh skiftir kanal og kallar á UHF:

-»Columbia«, Houston. Hetta er samskiftisroynd á UHF.

Hesi orðini endurtekur hann fleiri ferðir, men uttan úr rúmdini er tøgn.